# Mallu Reynbú til minnis

Sunnudagin bórust boðini um, at Malla, abbasysti, var farin. Boðini komu ikki óvart á, tí hon rakk so høgan aldur, var mett av døgum – hon hevði fylt 101 hósdagin. Men tó, tað er altíð sárt at missa.

Malla var úr Funningi, og har hevur hon búð næstan alt æviskeiðið. Hon var dóttir Osvald og Karolinu Jacobsen, og hon var næstelst av fimm systkjum. Tríggir brøður og tvær systrar. Eftir á lívi er nú bert Jóhannus, abbi, skómakarin í Fuglafirði. Hann var yngstur – verður 92 í september. Elsta systirin, Magnina, búði eisini í Fuglafirði. Hini trý, Malla, Jákup Sigurð og Dia búðu øll í Funningi.

Sum ung tænti Malla í Havn, og hon greiddi okkum ofta frá, hvussu lívið var í Havn tá – og hon kendi sera væl gomlu Havnina og kendi flestu stovurnar har og visti nógv um fólkið har tá at siga. Malla tænti hjá Andrias Ziska. Hon var eisini eitt skifti á Hvítanesi og seinni á húsarhaldsskúla í Høng í Danmark.

Síðani flutti Malla aftur til Føroya – og til Funnings. Har giftist hon Dánjal Martini Johannesen, seinni Reynbú.

Tá Sosialurin fyri einum ári síðani hitti Mallu í sambandi við 100 ára føðingardagin, greiddi hon m. a. frá, hvussu tað gekk til, at hon og Dánjal Martin giftust. Hon greiddi soleiðis frá:

"Tað var eitt kvøldið, eg sat einsamøll inni í køkinum hjá okkum í Funningi, at Dánjal Martin kom inn á gólvið. Hann plagdi vanliga at ganga har. Hetta kvøldið setti hann seg niður, og so kom tað bara. Jú, hann hevði hugsað um hetta, um tey ikki bara skuldu kasta saman bæði. Hann helt, at tey vóru væl egnað saman. Hon fekk tveir møguleikar at svara. Einki uttanumtos. Hon kundi svara »ja« ella »nei«.



– Svarið varð »ja«, og tað havi eg ongantíð angrað, segði Malla."

Dánjal Martin, sum var sjómaður, og Malla høvdu eitt langt lív saman, hann doyði í 1987. Tey áttu eingi børn, men tey tóku systurson Dánjal Martins, John, til sín, tá hann var heilt lítil, og mamman doyði frá honum og systkjunum.

Tað var altíð so hugnalig at koma norður til Funnings at vitja Mallu og Dánjal Martin. Tey vóru so góð við børn, og vit kendu okkum altíð væl hjá teimum.

Tá eg fyri tíggju árum síðani starvaðist sum lærari á Felagsskúlanum á Oyrarbakka, plagdi eg onkuntíð at koyra norð at vitja abbasysti, sum tá var farin um tey níti. Og hon var sum altíð blíð, skjót við einum drekkamunni, og hon visti eisini, hvørji funningsbørn gingu á Oyararbakka. Hon fylgdi væl við – og var eisini væl kunnað um tað, sum fyrifórst í samfelagnum annars.

Tá Malla var komin væl upp í nítiárini, vitjaði hon framvegis abba í Fuglafirði, og tað var ikki sørt lívsjáttandi at síggja, tá hon hjálpti abba at strúka gardinurnar – næstan hundrað ára gomul.

Tað var eyðsýnt, at Malla var eitt fegið menniskja. Hon var glað fyri lívið, og hon helt, at hon hevði fingið so nógv. Men hon visti eisini, hvørjum hon skuldi takka. Hon var eisini fegin um at sleppa at búgva í Korndalsbýlinum á Eiði tað síðsta árið, ella gott og væl tað. Tá hon í fjør fylti 100, segði hon, at hon visti, hvar leiðin bar: "Hjá mær hevur alt verið gott. Og nú eri eg so gomul, at eg havi ikki annað at gera, enn at leggja meg í Harrans hendur. Eg veit, hvar eg fari…«, segði hon.

Friður veri við minninum um Mallu, abbasysti.

**Eirikur**

# Danskur gandakallur vitjar

Ein tann virknasti danski undirhaldarin fyri børn fer at ganda og spæla klovn til stórt barnatiltak á ólavsøku. Trølla Pætur og omman verða noydd at renna undir løgreglguni, sum fer at leita eftir teimum

Tórshavnar Ítróttaráð spílar seg rættiliga út við tiltøkum til børnini á ólavsøku. Tað hevur sjáldan áður verið so nógv spennandi á skránni í tjaldinum í Kommunuskúlagarðinum, sum tað er á hesari ólavsøkuni.

Ólavsøkuaftan og ólavsøkudag verður stórt barnashow við danska undirhaldaranum Niels Plys, Trølla Pætur, Trølla ommuni og Erling politisti.

Niels Plys er vorðin besti vinurin hjá donskum børnum. Hann er víðagitin í Danmark fyri sítt stuttliga undirhalda og tey ørandi gandakynstrini.

Niels Plys hevur úr at gera. Hann er fastur undirhaldari á kenda feriustaðnum Lalandia, og hann ferðast eisini kring alt Danmark og í útlandinum við sínum undirhaldandi showi.

Hann fær børnini at flenna í kíki, tá hann spælir klovn, og hann fær tey at stara púra bðtt, tá hann vísir gandakynstur síni. Her er talan um barnashow á høgum stigi.

Trølla Pætur og omma hansara hava seinastu tíðina arbeitt við einum nðggjum filmi, og tey hava gjørt upptøkur bæði heima og úti. Tey hava eisini verið á rock ´n roll skeiði uttanlands, og omman er blivin púra vill. Hon hevur lokkað Trølla Pætur til at gera eitt rockshow á ólavsøku, og tað verður tjaldinum í Kommunuskúlagarðinum.

Har verður mangt og hvat á skránni, nógvir góðir sangir, skemt og ymiskt undirhald.

Tiltøkini við trøllunum og gandakallinum verða í tjaldinum í Kommunuskúlagarðinum ólavsøkuaftan kl. 19.00 og ólavsøkudag kl. 18.30.




**CITROEN SAXO 1.5D 3H**
Árg Jan-00, Km 64.500. Kr. 99.000.



**CITROEN XSARA 1.9TD 5H**
Árg Jun-99, Km 117.000.
Kr. 137.000.



**CITROEN XSARA 1.6I STC**
Árg Apr-99, Km 36.000.
Kr. 133.000.



**CITROEN XANTIA 2.0HDI 5H**
Árg Jun-99, Km 43.000.
Kr. 160.000.



**CITROEN XANTIA 1.9TD STC**
Árg Mar-99, Km 45.000.
Kr. 160.000.



**MITSUBISHI PAJERO 2.8TDI**
Árg Sep-97, Km 82.000.
Kr. 177.000.



**MITSUBISHI GALANT 2.0**
Árg Jun-92, Km 150.000.
Kr. 37.000.



**MITSUBISHI CARISMA 1.6I 5H**
Árg Mar-97, Km 64.000.
Kr. 105.000.



**FORD MONDEO 1.8 4H**
Árg Jun-01, Km 16.000.
Kr. 210.000.



**JEEP CHEROKEE 2.5TD VAN**
Árg Jul-97, Km 80.000. Kr. 135.000.



**MAZDA DEMIO 1.3 5H**
Árg Feb-99, Km 50.000. Kr. 87.000.



**PEUGEOT 306 1.9D 4H**
Árg Apr-95, Km 152.000.
Kr. 80.000.



**SEAT CORDOBA 1.9SDI STC**
Árg Aug-99, Km 36.000.
Kr. 115.000.



**SUZUKI BALENO 1.6I 4H**
Árg Apr-00, Km 27.500.
Kr. 105.000.

CITROËN Mercedes-Benz MITSUBISHI MOTORS
**Ivan Johansen Bilar**
Tel 313666 • www.ivan.fo •e-mail: ivan@ivan.fo








Tú ert millum 13 og 25 ár. Alt annað er líkamikið. Dámar tær 1nú romantiskar tónar, tá ið tit eru 2eini? Ert tú tann seigi, sum einsamallur 3vur í Ormin Langa, ella hin bragdliga, sum altíð skalt 4 nakrar flatar? Setur tú hvørt 5oyra inn á kontu ella keypir tú heldur 6tanda parið av diesel-buksum? Nýforelskaður og í 7. himni, ella bert tú als ikki 8 fyri at vera single? Eisini líkamikið! Fá tær bara eitt av spildur9 +kortunum frá Føroya Sparikassa. Tú kanst velja millum 10! Við egnum nick-navni, sjálvandi ;)

Bílegg títt +kort í Føroya Sparikassa. Eisini um tú hevur eitt frammanundan. Hav eina passmynd av tær sjálvum við. Tú fært nýggju stakfløguna hjá Brandi Enni beinanvegin – ókeypis!

**Atgongumerki til konsertirnar hjá Brandi Enni, 28. juli, fáast í Føroya Sparikassa.**

**Plusspakkin:** Í plusspakkanum eru tvær kontur og eitt +kort. Fyrra kontan, +Spar, er bundna sparikontan. Seinna kontan er +Kontan. Hon er brúkskonta við tínum serstaka +korti.

FØROYA SPARIKASSI
www.sparikassin.fo




GSM FRÍTÍÐ
FØROYATELE
Skapið framtíðina saman við okkum

Sosialurin
Lesið Sosialin
-tað loysir seg!